**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1418**
**Tíðarskeið 14/5-19/5-2014**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Karin Margretha H. Larsen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar og at taka fortoyingar upp. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum, og er partur av NACLIM verkætlanini.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2 glúpur og útgerð at taka fortoyingar upp við umframt dreggj.

**Um túrin:** Vit fóru út mikukvøldið 14/5 kl. 2300. Siglt varð norðurum har ramman NWNA1306 og boyurnar NWNB1306 og NWNG1306 komu upp í øllum góðum. Samband var eisini við rammuna NWNE1106, men sum væntað, so kom hon ikki upp. Roynt var eisini at fáa samband við NWNG1206, men hon svaraði heldur ikki hesaferð. Síðan sigldu vit vestur á Íslandsryggin og tóku CTD á skurði R og M vestanfyri Mykines. Haðani gekk leiðin til Bankarennuna har vit tóku boyurnar NWFB1306 og NWFC1306 upp í øllum góðum, áðrenn vindurin vaks – hetta var fyrrapart fríggjadagin 16/5. Eisini var ein CTD-støð tikin á NWFC. Síðan var siglt út á Bankan har vit tóku CTD og glúp á skurði V eystureftir. Hetta var liðugt um midnátt fríggjakvøld 16/5.

Siglt var nú spakuliga móti positiónini hjá "lítlu rammu" undir Vágalandinum. Hendan ramman kom ikki upp í fjør. Í lýsingini leygarmorgun 17/5 var fyrst roynt at skjóta rammuna leysa á ymsum støðum, í fall ramman hevði flutt seg, men ongin ramma var at síggja. Síðan bleiv dreggja í umleið 3 tímar, men heldur ikki tað gav nakað úrslit. Vit góvust við hesum beint eftir kl 8 og løgdu leiðina suður á Munkagrunnin.

Kl 12:30 leygardag 17/5 byrjaðu vit at taka CTD eftir skurði Z. Eftir nátturða vóru vit komin til rammuna NWZA1306 og vit tóku hana og boyu NWZB1306 upp í øllum góðum áðrenn skýming. Síðan var hildið fram við CTD eftir skurði Z heilt inn til skotska landgrunnin. Hesin skurður var liðugur sunnumorgun 18/5 kl 8.

Frá skurði Z gekk so leiðin til eystastu støð á skurði E – ein teinur uppá 139 fjórðingar – hagar komu vit sunnukvøldið 18/5 kl 22. CTD og glúpur blivu síðan tikin á skurði E inn móti Høgnaboða, sum er síðsta støð. Vit vóru liðug fyrrapartin mánadag 19/5 og sigldu síðan á Havnina – vit vóru við kai á middegi.

Alt gekk væl og alt riggaði, sum tað skuldi á túrinum. Tó at veðrið var ikki av tí besta fyrstu dagarnar og at tað fríggjadagin var skrið ella stormur eitt skiftið, so nervaði hetta ikki arbeiðnum umborð. Síðsta dagin var stilli.

Yvirhøvur var lítil gróður at síggja bæði á Landgrunninum og úti á. Grind var at síggja í Hetlandsrennuni.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 69 støðir og saltprøvar á meiri enn helvtini av støðunum. Við WP2 glúpinum tóku vit 18 støðir. Vit tóku 7 ADCP-ir (streymmátarar) upp.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst.

**Viðmerkingar:** Ongar

20-05-2014

Karin Margretha H. Larsen og Regin Kristiansen



Kósir og støðir á túri 1418